LM-099/2023

Fylgiskjal 47

Viðmerkingar til uppskot um til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin).

Sum bóndi, eigari, bygdamaður, framleiðari av burðardyggum mati kann eg als ikki liva við uppskotinum til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu. Tit eru hjartaliga vælkomin at spyrja um útdýpandi viðmerkingar til eitt annað og betri uppskot. Sum bóndi fulla tíð havi eg ikki havt stundir at gera allar tær viðmerkingar, sum ynskiligt hevði verið. Tó havi eg hesar viðmerkingar til lógaruppskotið um burðardygga ferðavinnu. Tær snúgva seg mest um djóravælferð og rættin at ganga hvar ein vil. Seyður og neyt í haganum og grasið á bønum eru okkara livibreyð. Einaferð var fuglur eisini tað.

Tað ber undir ongum umstøðum til, at fólk skulu ganga frítt allastaðni, um bygdasamfelagið skal haldast koyrandi, tí at brúkarin er besti og einasti egnaði at taka sær av bø/haga og tí sum har til hoyrir. Kommunur og nevndir eru bara dýrari, frástøðan økisti og tað er at biða um stríð og klammarí. Tað er løgið, at einans bøndur og bygdafólk skulu líða undir ótálmaðir ferðafólkavinnu. Tað er ikki skilagott at taka Hagalógina av.

Tá ið seyður verður órógvaður tekur hann skilaleys val, tí hann kennir seg hóttan og forfylgdan. Tað er møsn, at gongufólk einans forstýra fjalldagar. Tey forstýra eisini í lembing, tá ærnar eru sera sárbærar. Tey forstýra óveðursdagar, tá ið seyðurin roynir at søkja sær skjól, og tey forstýra, tá ið herðsla er, tí seyðurin eigur ikki góðar píkaskógvar. At missa ræðisrættin í haganum verður dýrt og hevur nógv stríð og kvalir við sær, eitt nú at søkja upp, sum sambært tryggingum er lívshættisligt og mest vandamikla arbeiði í Føroyum.

Vit eiga eitt lítið land, og tað er ikki pláss fyri at fenaður og ferðafólk skulu gera sum teimum lystir. Ein teirra má víkja. Og eftir øllum at døma er tað landsins vilji at bygda- og bóndalív skal víkja.

Tað er skeivt, at kommunur skulu umsita hetta mál, tí fleiri av kommunum eru smáar, hava lítla og vánaliga umsiting og fleiri teirra klára, sum er, ikki at røkja teirra skyldur á smáu bygdunum. Til dømis at hava kompetent garðasýn. Fleiri kommunur hava ymisk áhugamál í ymiskum bygdum og í smáu kommunum sita ferðavinnuaktørar ofta í umsitingini. Taparar verða brúkarar og markatalsbygdir. Sum dømi kann nevnast, í Sørvágs kommunu eru 4 markatalsbygdir, men ongin staðbundin nevnd og 4 ymiskar mentanir.

Tað er ikki skilagott, at avtaka rættin at ganga við hundi í bandi eftir varðagøtum. Viðhvørt skal fjallfólk ganga gjøgnum ein ella tveir hagar fyri at kom í ódn, tað verður stríggið at bera ein ella tveir hundar í ryggsekkinum, og helst er tað í stríð við lóg um vælferð hjá djórum. Tað ger heldur

ongum nakað, at ein bummullhundur úr býnum gongur eftir einari bygdagøtu í sínum keypta hálsbandi. Hetta er ein beinleiðis tápulig broyting.

Brúkari og eigari verða kroyst, tí tað er ómøguligt at halda djóravælferðarlógina og hava fría ferðavinnu, tí eg sum bóndi/brúkari havi ábyrgd og skyldu mótvegis dýrunum. Tað vil siga, at kemur ein seyður illa fyri og/ella doyr, dettur oman, stendur fastur í mýru, hegni o.s.fr., tí hann er rikin av haga/ úr sínum vanliga tilhaldsstað, so er skuldin og ábyrgdin mín! Hetta er fíggjarligur missur og skal mann søkja upp, er tað eitt forferdiligt baks. Tað skulu í mongum føri 6 egnaði fólk úr sínum borgarliga arbeiði at bjarga einum forstýraðum seyði, umframt tilrigging við bondum, nót, pelum o.s.fr. Hetta er eitt óneyðugt dagsverk, sum kom av, at onkur mátti og skuldi ganga har, hann vildi. Seyður er støðufastur og tvørur, men er hann fyri áhaldandi rakstri og órógvi, so verður hann frustreraður og tekur óráð fyri. Í mínum haga er lembing/føðideildin hjá óm á leiðini til Árnafjall. Hagar skulu partú øll gongufólk í maimánaði og tað órógvar mín seyð sera illa. Hvørt ár kemur onkur ær illa fyri ella missir lambi, fyri meg er tað tap og fyri ærina ein sorgarleikur, men gongufólki fekk selfie! Føroyar eru ymiskar og várið kemur seint til Gásadals, maimánaður er enn kaldur og kargur, hóast lombini eru komin um alt Føroya land. Gomul gransking vísir, at tað eru 70 dagar á muni millum vár í Kirkjubø og í Gásadali, men sambært onkrum eru Føroyar alfagrar í mai og so skal gangast.

Nógv tíð fer við at halda seyð á røttum stað, tí hann hevur verið órógvaður av fólki, sum gongur har tað vil, og helst eisini tí har eru lekkrar myndir at fáa.

Lógaruppskotið um burðardygga ferðavinnu hevur ALS ikki fyrilit fyri fuglalívið fram við sjónum og í bjørgum. Tað er óalmindiliga løgið!

Í bakkanum í Gásadali eiga nakrir fuglar. Tá ið tað bleiv koyrandi til Gásadals komu fólk aðrastaðni at hyggja at teimum, tí tað er ikki allastaðni, at tað ber til at standa á vegnum og hyggja at t.d. lundum. Nakrir turistar fóru í bakkan at hyggja nærri, men síðani eitt band varð sett upp fram við eggini og eftir gøtuni fyri at halda fólk frá bakkanum og tálma gongd í grasi, so fjølgaðust fuglarnir, tí teir vistu, at teir vórðu ikki órógvaðir. Hetta var gott. Men so komu skjóttgangandi bátar, ein fyri og annar eftir, at sigla allan dagin, fyrilitarleyst fyri alla náttúru. Hesir bátar larma illa og styggja, at fuglurin fer av landinum (má fara av reiðri, úr holum) og upp av sjónum í heilum, og heldur ikki um kvøldið er friður. Hetta eru ikki góð kor hjá fugli at forsyrgja sínum pisum og ungum. Teir flúgva langt fyri at finna føði og baksa seg heim aftur til oljuroyk og larm. Hesir bátar, til nøkur fá fólk, hava størri maskinorku enn línubátar, sum fóru á Flemish Kapp í vælmaktstíðini høvdu. Nú eru

færri fuglar enn tað vóru, áðrenn hesir bátarnir fóru at sigla. Hetta er eitt ítøkiligt dømi um ferðavinnu, sum ikki er burðardygg, hvørki fyri fugl ella viðvíkjandi oljunýtslu. Missa vit fuglin, so er einki at sigla eftir. Fuglur taðar eisini og eigur sín part í einum grønum Føroyum.

Ferðavinna er svørt úr enda í annan. Talan er um flogferðslu, skipaferðslu, bilferðslu og hesir vælsignaðu leigubilar. Leigubilar og óvandalig koyring eru ein ampi fyri ferðslutrygd um alt landið, tí hesir bilførarar steðga brádligа mitt á vegnum, allar hurðar upp og øll ljós blunka, so vandin tykist stórur. Ein túrur til Havnar er blivin 15 minuttir drúgvari, tí leggjast skal upp fyri ivasamari koyring frá leigubilum.

Tað er ósømiligt at dríva vinnu inni á ognum og økjum hjá øðrum. Hetta er mítt livibreyð og starv, sum eg geri mær stóran ómak við. Eg gangi høgt upp í burðardygd, at fara væl um og vera góður við dýrini. Tí harmar tað meg, at onnur, sum als ongan áhuga hava í burðardyggum Føroyum skulu ganga fyri vág og vind og gera sum teimum lystir.

Viðvíkjandi gjaldi so veit eg, at tað fer ongantíð nøkur króna at koma út til mín eigara, bónda, bygdamann í Føroya mest vitjaðu bygd.

Ongin fuglur, minni gras í bjørgum og líðum, færri og rakari fenaður.

Onki gras ongar Føroyar.

Við vón um, at onkur lurtar eftir okkum, sum búgva og liva í Gásadali. Og altíð hava búð her.

Jóhan Dávur Joensen

Tøðutún 6

387 Gásadalur

&

Dávur Joensen

Tøðutún 6

387 Gásadalur